# Kjak



**Óli Mikkelsen**
*lækni*

# Sjúklingurin í fokus ella lokalpolitikkur!

Í bløðunum 19. og 20. januar hevur Aksel Johannesen eina grein við heitinum: sjúklingurin í fokus.

Tá tú hevur lisið nakrar reglur stendur:

**“Sum landsstýrismaður í heilsumálum skal eg sláa fast, at eingin ivi skal verða um, at okkara heilsuverk altíð strembar eftir at fylgja fakligum tilmælum frá danska Heilsustýrinum”.**

Longu í næstu reglunum sigur hann, at vit ikki kunnu brúka tilmælið frá heilsustýrinum. Ført verður fram, at tá vit við 50.000 fólkum ikki hava upptøkugrundarlag fyri einum sjúkrahúsi, skulu vit útbyggja trý sjúkrahús. Gamla føroyska sjúkrahúslógin sigur trý sjúkrahús. Nú skal lógin fylgjast, trý sjúkrahús á trimum matriklum.

Við hjálp frá Hans Paula Strøm hevur Aksel fingið játtan til landsumfatandi endurvenjingardeild og ryggambulatorium á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, játtað eftir krøvum frá lokalpolitikarum.

Nú skal urologisk serdeild skipast í Klaksvík. Ráðgeving er frá føroyskum urologi sum arbeiðir í Aalborg. – Lat okkum síggja hesa tilráðing!

Sjálvur arbeiddi eg á narkosudeildini á Aalborg Sygehus Nord hálvtfjórða ár frá 1969 til 1973. Urologisk deild fyri Aalborg og økið rundanum var har, so stórur partur av arbeiðnum á skurðdeildini var urologi.

Sjúkrahúsini í Danmark komu í ræsshaft.

Í nógv ár vóru tvey sløg av sjúkrahúsum: Amtsygehus og Kommunehospital, tey vóru ofta stutt frá hvørjum øðrum.

Í Aalborg vóru nakrir hundrað metrar millum hesi sjúkrahús.

Tá vitanin um sjúkur og sjúkuviðgerð øktist í stórum, riggar hetta ikki longur, og sjúkrahúsini vórðu løgd undir sama “reiðarí”.

Tá eg arbeiddi í Aalborg, var eg mitt í hesum rembingum. Sjúkhúsini høvdu skift navn til Aalborg Sygehus Nord og Aalborg Sygehus Syd.

Nú stinga serdeildirnar seg upp, og verða býttar millum sjúkrahúsini. Meðan eg arbeiddi har, fingu vit hjartadeild og lungakirurgi. Aðrar deildar fóru á Aalborg Sygehus Syd.

Nú er sperðil í. Serdeildirnar verða býttar sundur á tvey øki, sum lógu nær saman; men ov langt var ímillum, til at samstarvið millum deildirnar kundi verða nøktandi.

Longu tá vóru ætlanir frammi um at samla serdeildirnar á Aalborg Sygehus Syd.

Í Aarhus varð skorið ígjøgnum, nýtt sjúkrahús bygt: Skeiby Sygehus.

Fara vit nú at leggja serdeildirnar í Føroyum út á trý sjúkrahús, koyra vit sjúkrahúsverkið eini 40 ár aftur í tíðina og spurningurin verður, um vit makta at arbeiða okkum uppaftur.

Útbyggið Landssjúkrahúsið, tí tað er betri fyri sjúklingarnar og bíligari fyri samfelagið, enn at senda ov nógvar sjúklingar av landinum.

Hetta segði ríkisumboðsmaðurin Niels Bendzen fyri meira enn 30 árum síðani.

Niels Bendzen var júst komin úr danska ministeriinum og hevði arbeitt við SJÚKRAHÚSMÁLUM Í TØTTUM SAMSTARVI VIÐ DANSKA HEILSUSTÝRIÐ.

Eg sigi ikki, at einki framstig er hent á Landssjúkrahúsinum; men kostnaðurin av at senda sjúklingar av landinum veksur við rúkandi ferð, er nú langt omanfyri 100 milliónir um árið.

Hava vit ikki gjørt ov lítið við at útbyggja Landssjúkrahúsið?

Hvat sigur ráðgevin hjá Aksel Johannesen um fíggjarstýring. Hans Pauli Strøm helt fyrilestur í læknafelagnum, tá hann var heilsumálaráðharri. Hans Pauli hevði lisið ritgerð frá búskaparfrøðingi um penganýtslu í heilsuverkinum. Niðurstøðan varð, at tað er púra ógjørligt at gera øllum til vildar, og at neyðugt er at stýra játtanum við skili og fastari hond.

Við at útbyggja trý sjúkrahús í Føroyum verður ringt at fáa nakað at rigga. Sjálvt føroyskir læknar koma ikki heimaftur.

Manningin verður konsulentar við høgari løn, og fyri føroyska samfelagið er tað, at tveita pengar út í annan heim.

Sjúkhúsverkið má ikki sindrast av lokalpolitikki.

Latið okkum royna at fylgja við tíðini og eftir førimuni fjálga um Landssjúkrahúsið, tí tað er tað besta og bíligasta fyri okkum øll.

---

**Rannvá Egholm**
*rannva@roddin.fo*

# Tekur MMR okkum ungu í álvara?

Næmingar skulu skriva nógvar føroyskar stílar ígjøgnum skúlaárið í framhaldsdeildini. Bæði í áttanda og níggjunda flokki. Viðhvørt leita lærararnir fram til tey gomlu stílheftini, tí úrvalið av stílheftum er heldur fátækt. Evnini í teimum gomlu stílheftunum eru ikki altíð viðkomandi fyri ungdóm í dag, og møguleikarnir at skriva ein góðan stíl eru tí ofta skerdir. Í skrivligum royndum verða gomul stílhefti tíbetur ikki nýtt. Ja, tíbetur er kanska skeiva orðið, tí tað so at siga góða, nýggja og viðkomandi stílheftið er alt annað enn á rættari kós, og brádliga leingist einum aftur til tað svart/hvíta stílheftið frá 90'unum.

Nógvir spurningar verða settir um føroyska skúlan, skúlaskipanina og Pisaúrslitini. Mentamálaráðið sigur, at vánaligi fakleikin hjá føroyskum næmingum ikki skal skapa ótta, men heldur takast sum eina avbjóðing. Skúlaskipanin broytist, kanningar verða gjørdar, og alsamt roynir mann at finna orsøkina til, hví føroyskir næmingar klára seg so illa. Men kann tað vera, at ein partur av orsøkini situr í Mentamálaráðnum sjálvum? Hvussu kann verða sagt við okkum ungu, at vit eru ov dovin, eru ov lítið málrættað og ikki taka skúlan í álvara, tá MMR ikki tekur okkum í álvara?

### “Nýggju og spennandi” stílevnini

Hesa vikuna hevur framhaldsdeildin og Nám-X í Eysturskúlanum í Havn verið til skrivligar royndir. Eg gangi í 9. flokki, og týsdagin, tá ið vit skuldu skriva føroyskan stíl, kom brádliga ein kend kensla fram. Tað var sama kenslan, sum eg fekk, tá ið vit í 6. flokki vóru í landsroynd í føroyskum. Tað var kenslan av, at onkur helt okkum fyri gjøldur.

Skriva um títt frítíðarítriv, skriva um tín yndisfilm og skriva um talentkappingar? Hvat eru tað fyri evni at koyra í eitt stílhefti til 9. flokk? Ja, at skriva føroyskan stíl týsdagin var ein sonn avbjóðing. Ikki tí at evnini vóru torfør, men tí at tey vóru so heilt av leið vánalig.

Eitt stílhefti skal hava evni, ið raka allar málbólkar í einum vanligum føroyskum 9. flokki. Evni til teir fakliga veiku næmingarnar, evni til miðal næmingin og evni til tann sterka næmingin. Her skal sigast, at einasti málbólkur, ið var raktur, var lægsti felagsnevnarin. T.v.s. tey, ið altíð leypa upp um garðin, har hann er lægstur. Tey, ið aldri gera sær ómak við skúlan og ikki leggja petti í, um stílurin verður góður ella vánaligur.

Vantandi hugflog og vitan innan fyri, hvat er viðkomandi fyri ungdóm er orsøkin til hetta. Tað er lítil nýhugsan í stílevnunum og einki nýfunnið tilfar. Tekstúrin til eitt stílevni er antin úr eini bók, eini blaðgrein ella onkrum øðrum líknandi. Tá ið tað er so einfalt at seta eitt stílhefti saman við tilfari, mann so at siga fær givið upp í hendurnar, hví eru tey so so heilt ótrúliga vánalig?

Vanliga eru tey ensku og donsku stílheftini betri enn tey føroysku. Men til hesa royndina vóru møguleikarnir at skriva ein góðan stíl ógvuliga skerdir, og tað var ringt at finna eitt hóskandi evni at skriva um.

### Føroyskir næmingar troyttir av at skriva um happing

Happing er ein stórur og afturvendandi trupulleiki í fólkaskúlanum. Nógvir eru teir næmingarnir, ið líða undir hørðu avleiðingunum av happing. Nógv verður tosað um happing í skúlanum fyri at fyribyrgja tí og koma tí til lívs. Eisini er happing eitt heitt og afturvendandi evni í stílheftum, so afturvendandi, at tað er í nærum hvørjum einasta stílhefti. Er hetta rætti máti at fyribyrgja happing? Eg ivist, tí á henda hátt at trútta happing niður í næmingar, ger, at teir lata oyruni aftur, bara teir hoyra orðið happing. Tað geri eg í øllum førum.

### Hvat vænta tit av okkum?

Vánaligu stílevnini vísa, at einki verður væntað av okkum næmingum í framhaldsdeildini. Gloppið er bara alt ov stórt frá vánaligum stílevnum í framhaldsdeildini til miðnám, har mann skal viðgera og grein tekstir. Einasta, vit næmingar vilja, er at fáa góð, tíðarhóskandi og spennandi stílevni. Tað skuldi ikki verið ov nógv at biðja um!